Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Tórshavn, 05. desember 2023
Journal nr.: 23/23697

Svar upp á § 52a- fyrispurning nr. 52-050/2023 frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni, um bygningin hjá Sjóvinnustýrinum

Spurningarnir vóru soljóðandi

1. Hvat kostar bygningurin hjá Sjóvinnustýrinum, nú hann er liðugur?
2. Hvør er fermetrakostnaðurin á bygninginum alt íroknað uttan ognan av lendi, nú hann er liðugur?
3. Hvussu er fíggjarliga býtið millum handverkaraútreiðslur, ráðgeving, ognan av lendi og annað?
4. Hvussu var byggingin skipað?
5. Hvussu er mann nøgdur við úrslitið, nú bygningurin er liðugur?
6. Hvørjar orsakir metir mann vera til, at byggingin hevur gingið, sum hon hevur?

Svar

Spurningur nr. 1

Byggiroknskapurin er ikki endaligur enn, men alt bendir á, at kostnaðurin verður innanfyri tær 30 mió. kr., sum verklagslógin ásetur.

Spurningur nr. 2

Fyribils, av tí at byggiroknskapurin ikki er endaligur enn, kann upplýsast, at fermeturkostnaðurin er 37.736 kr/m^2.

Spurningur nr. 3

- Handverkaraútreiðslur 23.779.651 kr.
- Eyka avtalur/veitingar og prísvøkstur í sambandi við handverkaraútreiðslur 3.978.872 kr.
- Ráðgeving 1.680.378 kr.
- Ognan av lendi 0 kr. – Føroya landsstýri gjørdi gerðabýti við Vága kommunu, har kommunan yvirtók eitt fyrrverandi grótbrot, sum landið átti, og landið yvirtók grundøkið, har bygningurin er staðsettur.
- Annað 561.099 kr.

Spurningur nr. 4
Bygningurin varð boðin út sum heildararbeiðstøka, sum merkir, at tað er arbeiðstakarin, sum skipar og samskipar arbeiðið, ger avtalur og hevur samskifti við undirveitarar. Arbeiðið varð skipað við føstum byggileiðara á staðnum.
Stýrisbólkurin/bygginevndin hittist mánaðarliga á byggiplássinum við umboðum frá arbeiðstakara (Sp/f Búsetur), ráðnum (UVMR), byggiharra (Landsverk) og brúkara (Sjóvinnustýrið).

Landsverk hevði dagliga samskiftið við byggileiðaran. Einki eksternt fakeftirlit var.

Spurningur nr. 5
Vit eru sum heild væl nøgd og fegin um verkætlanina.

Spurningur nr. 6
Tað eru fleiri viðurskifti, sum skulu samvirka, fyri at ein bygging er væleydnað. Áðrenn verkætlanin varð boðin út, vórðu tørvurin hjá Sjóvinnustýrinum og byggiskráin væl allýst. Sostatt var útgangsstøðið fyri verkætlanini greitt frá byrjan.

Eftir at útboðsvinnari varð funnin og farið varð undir byggingina, hevur dentur verið lagdur á at halda seg til tilboðið og byggiskránna, tað vil siga at ikki gera broytingar.

Ein viðvirkandi faktorur, sum eisini er týdningarmikil, er, at tað í byggitíðarskeiðinum hevur verið regluligt samskifti millum byggiharra og arbeiðstakara umframt uppfylging frá stýrisbólkinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 05. desember 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður